# Ynskja samstarv við russar

**Leiðslan í Faroe Seafood ynskir at fáa samstarv við russisku skipini, sum liggja í føroyskum havnum og keypa upsa. Ætlanin er at lata russararnar fáa tann smáa upsan, men at tann størri fiskurin skal arbeiðast á landi**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

Faroe seafood ynskir at fáa samstarv heldur enn kapping við russisku skipini um upsan, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri.

– Vit ætla at keypa fiskin, skilja hann og lata russum tað smáa umborð, og so sjálvir arbeiða tann størra fiskin, sum meira fæst burturúr, sigur hann.

Meinhard Jacobsen greiðir frá, at Faroe Seafood hevur samband við nøkur ávís skip um eina ætlan um gongur út uppá, at felagið keypir upsan frá teimum, skilir hann og letur russisku keypararnar fáa tann smáa fiskin, sum minst fæst burturúr.



*Upsin eigur at verða bólkaður av nýggjum, heldur stjórin í Faroe Seafood. Tann heilt smái fiskurin skal í bólk fyri seg, so lættari verður hjá keyparanum at fáa tað, hann kann gagnnýta, heldur hann*

*Mynd: Edvard Joensen*

Støðan í dag, har ein alt ov stórur partur av tí upsa, sum fiskaður verður, endar umborð á russisku skipunum, er ikki haldbar, sigur Meinhard Jacobsen.

## Ójøvn kapping

Hann vil ikki einans geva russisku skipunum skyldina fyri, at føroysk virki liggja still. Tað kann hava ymsar orsøkir, sigur hann. Kanska tað, at minni er til at fiska, kann vera ein grund, heldur hann.

– Men tað er greitt, at tá vit kappast undir so ymsum fyritreytum, sum talan er um í løtuni, kann tað bara gerast ein vinnari. Tað er tann, sum arbeiðir við lægru lønunum og ongum tollmarkið. Altso russararnir, sigur stjórin á Faroe Seafood.

Hann sipar til lønarlagið, sum er lægri hjá russum, og ikki minst til ta manglandi fríhandilsavtalu við Russland, tosað hevur verið um í áravís. Russar skulu ikki gjalda triðjalandstoll fyri føroyskan upsa, sum teir selja aftur á heimamarknaðinum. Var fiskurin hinvegin arbeiddur á føroyskum virki og síðan seldur til Russlands, varð eitt rímiliga høgt avgjad lagt á hann.

– Vit føla, at hatta hevur tikið marginina av teimum seinastu oyrunum, vit skuldu forvinna, sigur Meinhard Jacobsen.

## Nýggj flokking

Meinhard Jacobsen sigur, at hann kundi hugsað sær, at upsi 4 varð flokkaður øðrvísi, enn hann er í dag.

Tað er ov stórur munur á fiskinum í hesum flokkinum, sigur hann. Tá vit keypa upsa 4, kann tað henda, at stórur partur av tí, vit fáa, er smáur fiskur, sum ov lítil úrtøka fæst burturúr.

– Var tað hinvegin so, at tann heilt smái upsin - ella seiðurin - eitt nú fiskur, sum er smærri enn 1,2 kg, varð flokkaður fyri seg, vistu vit, at vit fingu fisk, sum vit kundu arbeitt, og restin kundi so verðið selt til dømis til russisku skipini, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Faroe Seafood.

# Kenn

**Ferðavinnan liggur í kenni. Hendan rakstúrin vænta tey at fáa væl av útlendskum stuttleikafiskarum, sum ætlanin er at fáa hendanveg at leggja pengar eftir seg**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tað tekur hjá Ferðaráðnum í løtuni. Hendan seinasta raksturin eru tað útlendskir stuttleikafiskarar, sum teir hava havt undir í royndini at fiska eftir fremmandafólki, sum fáast skulu hendanveg at ferðast.

Ferðaráðið fer nú undir at samskipa stuttleikafiskiskapin á sjónum. Ein faldari, sum lýsir teir møguleikar, vit hava at bjóða á økinum, er klárur til prentingar og verður lagdur fram á komandi VestNorden Travel Mart stevnu, sum verður hildin í Keypmannahavn í heyst.

Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráði Føroya, sigur, at hann væntar, at stuttleikafisking á sjónum kann gerast eitt gott íkast til føroysku ferðavinnuna.

Møguleikarnir eru góðir fyri at fáa fremmandafólk hendanveg at halda snøri - ella helst at fara á flot við tráðu. Serliga stórur er áhugin fyri slíkum millum týskarar, men eisini bretar eru væl við, sigur hann.

Og tað er júst her, satsað verður í løtuni, vísir hann á. Smyril Line leggur seg eftir at fáa nógvar týskarar við Norrönu, og Atlantsflog leggur sínar rutur til Bretlands.

Smyril Line ætlar at satsa stórt fyri at fáa hesar stuttleikafiskararnar hendansveg, segði marknaðarleiðarin hjá felagnum í sjónvarpskjakinum týskvøldið. Eisini nýggi stjórin í felagnum helt hendan málbólkin vera verdan at fáa undir.

Men tað, hann segði um, at norðmenn hildu tað vera vorðið ov nógv av tí góða við øllum týskarunum, sum liggja við tráðu á norsku firðunum. Teir taka so nógvan fisk, segði stjórin á Smyril Line, at norðmenninir eru farnir at órógvast. Kortini helt hann, at tað eigur at bera til at fáa teir hendanveg.

Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum, óttast ikki fyri at teir fara at oyða okkara grunnar, um teir koma til Føroya at ferðast og fiska.

– Lat okkum taka í móti teimum og siga takk, um teir koma fleiri, sigur hann. Talið fer at avmarka seg sjálvt. Tí beri eg ongan ótta fyri. Nú skulu vit síggja tíðina ann og vita, hvussu tað kann útvikla seg, sigur ferðavinnustjórin.

Hetta við stuttleikafisking á sjónum er ikki nakað nýkmið, vísir Heri Niclasen á. Tað er longu roynt nógvastaðni í Føroyum, og fleiri bátar eru, sum regluliga eru á floti við ferðafólki, ið so eisini kasta fram við landi, tá tað verður ynskt.

– Tað, sum nú hendir, sigur hann, er at vit fara at royna at samskipa tað betri og menn produktið. Í fyrsta lagi við hesum faldaranum, sum lýsir møguleikarnar so sum leiðir og líkindi, bátar, sum avmyndaðir eru bæði innan og uttan o.s.fr, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya.



*At útlendsk ferðafólk, sum vitja hendanveg, eisini fara á flot, er einki nýtt. Men nú skal tað samskipast og mennast, sigur stjórin á Ferðaráðnum*

*Mynd: Edvard Joensen*